"Byrjað verður frá botni. Eingin skal smæðast. Vit ganga út frá, at fólk, sum koma til okkara, duga IKKI at stava, TÍ koma tey til okkara. Og tað merkir, at eingin skal kenna seg illa.

Vit hava sett okkum fyri, at fólk fara frá okkum aftur við styrktum sjálvsáliti."




# Kundi tú hugsað tær at stavað vanlig boð og brøv rætt?

## - og lært tað skjótt?

**So er møguleikin her!**

Í februar heldur forlagið SPROTIN eitt intensivt skeið í føroyskari stavseting.

Skeiðið er ætlað øllum, ið ikki halda seg vera stinn at stava. Málið er at beina fyri øllum teimum vanligastu stavivillunum eftir tveimum vikum.

Jonhard Mikkelsen stendur fyri undirvísingini, og hjálparlærarar fara ígjøgnum venjingarnar hvør saman við sínum 10 skeiðsluttakarum.

Skeiðið verður á Føroya læraraskúla í 7., 8. og 9. viku.

Allar vikurnar: týskvøld og hóskvøld frá kl. sjey til tíggju.

Kostnaður er 3500 kr. fyri øll 6 kvøldini. Tá eru bók og kaffi íroknað.

Kundi tú hugsað tær hetta, melda teg til á **www.sprotin.fo**

**Seinasta freist at tekna seg til skeiðið er mánadagin seinnapart.**

sonjakjølbro 258600

## Nøkur, ið vóru á seinasta skeiðið - Brot úr samrøðum við Sosialin

*Myndamaður: Álvur Haraldsen*



*- Eg vildi fegin rudda upp í mínum stavifeilum, bæði ð og komma, tí eg skrivi rættiliga nógvar mailar hvønn dag.*

*Joen Remmer, flogskipari*



*- Eg havi lagt til merkis, at tað er ymist, sum eg javnan ivist í, og tað vildi eg hava upp á pláss*

*Erika Lómstein Petersen, skrivari*



*- Tú kanst heldur ikki vænta at verða tikin í álvara, um tað, tú skrivar, er fult av feilum, so eg gleðist um, at tað hevur eydnast at fáa flestu ðini upp á pláss.*

*Gunnar Mohr, stjóri*

SPROTIN

Hornavegur 12 • FO-350 Vestmanna • Føroyar
Tel. 214248 • sprotin@sprotin.fo • www.sprotin.fo

Forlagið SPROTIN byrjaði við undirvísingartilfari. Síðan varð farið undir fagurbókmentir. Í 2005 komu víða gitnu internet-orðabøkurnar út. SPROTIN hevur nógv brúkta rættlestrar- og týðingartænastu og sendir dagliga út tekstir á tænastuni FREGNIR. Skeiðsvirksemi er seinasta takið, ið farið er undir.